Summar FESTIVALUR – HAR HITTINI HITTAST



# SYNDARAR á Summarfestival

**Tað snýr seg ikki einans um at syngja. Tað snýr seg um at undirhalda. Og tað dugdi Bárður á Lakjuni, oddamaður í T.O.S, ið stendur fyri tollarar og syndarar.**

Óli Jákup Jacobsen

Spennandi bólkurin úr Eysturoynni T.O.S. spældi í Flags tjaldinum á Summarfestivalinum í dag. Hetta var somuleiðis talan um teirra fyrstu útgávukonsert.

Rættiliga nógv av fólki var møtt upp at lurta eftir tollarunum og syndarunum, har tjaldið var umleið trýkvart fult.

Tónleikurin hjá T.O.S. er sermerktur ella originalur á fleiri hættir. Fyrst og fremst spæla teir rytmiskan polka og tango tónleik, sum fær áhoyrararnar hug til at trippa eitt sindur. Haraftrat hava teir nógv ymisk ljóðføri, sum ikki eru so vanlig á rockutum tónleikapallum. Millum annað varð harmonika brúkt umframt ein stór blikktrumma og eitt blásiklaver, sum líktist mest eini vatnpípu. Alt hetta ger T.O.S. til ein stuttligan, originalan og forvitnisligan bólk.

Konsertin hjá T.O.S eydnaðist avberað væl, har Bárður dugdi at fáa áhoyrararnar at flenna millum sangirnar. Sangirnir vórðu eisini framførdir sera hegnisliga, har tónleikararnir dugdu sítt kramm. T.O.S. er uttan iva ein tann mest spennandi bólkurin í Føroyum í løtuni.

# Rokkbrak frá ONIONTREE



**Ungi rokkbólkurin Oniontree, sum vann heitið "Besti nýggji bólkur á Planet Awards í fjør, er kendur fyri sínar liveframførslur, og er ein av stóru rokkvónunum í Føroyum.**

Sissal Kampmann

Teir fýra í bólkinum, Sigmund Jørgensen, guitar og sang, Magnus Ovason, trummur, Jan Mýrá, bass og Fríði Øster, guitar, hava m.a. spælt á" Staðnum" í Vestmanna, í "Húsinum" í Klaksvík, men teir hava eisini spælt á kenda rokkspælistaðnum "The Rock" í Keypmannahavn, har teir hitaðu upp fyri kenda bólkin "Yashin" í feruar í ár.

## Nógv talentir

Oniontree spældu í Flags Tjaldinum á Summarfestivalinum fríggjanáttina kl. 01.30, og har fingu áhoyrararnir eina tónleikaupplivíng, ið hóast hon var borin av tyngri rokktónleiki eisini bjóðaði uppá ein akustiskan sang og guitarspæl, framførdan av sangaranum Sigmundi einsamallum á pallinum. Við hesum sangi, sum Sigmundur kallar "Memories", fingu vit høvi til veruliga at hoyra fantastisku røddina hjá Sigmundi. – Eg geri meir og meri við singer/songwriter genruna, greiður Sigmundur frá. – Eg haldi hetta er spennandi og avbjóðandi, og tað er fínt at hava avtrat tí meir punk, rokkuta stílinum vit í høvuðsheitum spæla, umframt tí blandingini av rokki og atmosferiska rokkinum, vit eisini fegnir vilja leggja okkum eftir.

## Besta tónleikaupplivíng nakrantíð

Teir vóru allir á einum máli um, at konsertin á Sf var ein fantastisk upplivíng, sum var tað besta teir hava uppliva sum tónleikarar higartil. Fríði segði eftir konsertina, at hetta samstundis var tað besta publikum, teir hava haft og at upplivingin fyri hann sum tónleikara ikki var minni enn genial. Og áhoyrararnir fingu eisini eina upplivíng, har tætta og dynamiska ljóðmyndin fylti alt teltið.

# Vísir hvør hon er

**Unga songkvinnan, Lív Næs framførdi á SF saman við Tróndi Enni og Una Reinert Debess.**

Sissal Kampmann

Tíverri leið framførslan hjá Lív undir ljóðroyndini hjá Carlsen, ið skuldi á pallin á Vágsbøi eftir Lív. Hetta órógvaði bæði Lív, tónleikararnar og ikki minst áksoðararnar ótrúliga nógv, og sjálvsagt var hetta heilt óacceptabult. Í fjør framførdi Lív saman við Niels Midjord, sum hon seinastu árini hevur spælt nógv saman við, og sum hon eisini hevur givið fløgu út saman við. Tá var sami trupulleiki galdandi, og vónandi vera slíkar umstøður ikki aftur.

## Stóra gjøgnumslagsmegi

– Tó skuldi nógv meira til fyri at oyðileggja nakað fyri framførsluna og gjøgnumslagsmegina hjá Lív, sum við sterkari manning, ið taldi Trónd Enni og Una Reinert Debess, spældi eina ótrúliga vakra og vælspælda, og ikki minst, vælsungna, konsert. Út yvir eitt lag hjá Bubbi Mortens, spældu tey bert egin løg, og tað var ein fragd at síggja og hoyra bólkin framføra fjølbroyttu og melodiøsu løgini. Lív megnar at halda seg til sín stíl gjøgnum alla framførsluna, og tað, ið tiltalaði mest var tað óskaputa og ókrukkuta yvir konsertinu, umframt at ein merkti, at hon ikki var bangin fyri at vísa hvør hon veruliga er og kann sum sangari.

